Til Friðingarnevndina í Eysturoy

## *Viðvíkjandi Hólmi á Eiði*

Fuglafrøðifelagið hevur lagt merki til, at partur av økinum nevnt Niðri í Hólmi á Eiði, er planerað. Hetta er nærri enn 300 metrar frá Vatninum.

Á heimasíðuni hjá Eiðis Kommunu (www.eidi.fo) sæst henda avgerðin (tikin 20. Juli 2007):

> **Mál nr.: 2007-0024-0001**
> Uppskot at fylla grót í Hólman við endamáli at byggja fótbóltsvøll/stadionøki.
> **Avgerð:** F.N. mælir til at fara undir við at fylla grót í Hólman beinanvegin og at arbeiði verður fíggja við innistandandi og lántøku upp til 10 mill.

Fuglafrøðifelagið metir, at økið við Hólman og Vatnið er serstakliga týdningarmikið hjá fugli. Fuglur er at síggja í Hólmanum og møguliga eigur jarðarkona har, men harumframt er tað helst so, at Hólmurin eisini hevur nógv at siga fyri fuglalívið á sjálvum Vatninum. Í økinum sæst ofta fuglur, sum ikki sæst nógv til aðrastaðni í Føroyum. Har sæst tannont, sjógvhøna, ógvella, teymont, svanur, súgont, trøllont og mangt annað.

Í bókini Ferðafuglur, sum Dorete Bloch og Søren Sørensen góvu út í 1988, stendur at lesa, at Eiðisvatn er eitt ógvuliga týdningarmikið stað hjá vatnfuglum, ið dvølja sum strokfuglar. Nú Eiðisvatn er tikið til vatnorku, er tað ikki so nógvur fuglur at síggja her, men Vatnið hevur møguliga tikið yvir henda leiklut. Í hvussu er bendur ríka fuglalívið á tað.
Partur av Vatninum og økið rundanum er longu tiki til ein fótbóltsvøll. Ætlaða stadionøkið verður ikki útbygging av hesum, men verður næsti fótbóltsvøllurin í somu kommunu.

- Hevur loyvi verið givið til at planera økið, sum sæst á viðheftu mynd?
  Um ikki, so vil Fuglafrøðifelagið heita á Friðingarnevndina um at taka málið upp.

- Hevur loyvið verið givið til at fylla í Hólman og byggja stadionøki (sí viðheftu myndir)
  Um ikki, so vil Fuglafrøðifelagið heita á Friðingarnevndina um at taka málið upp sum skjótast. Serstakliga við atliti at avgerðini "at fylla grót í Hólman beinanvegin".

Vegna Føroya Fuglafrøðifelag
Janus Hansen, formaður

-------------------------------
Føroya Fuglafrøðifelag
ffff@kallnet.fo
www.faroenature.net/ffff


Planeraða økið




Ætlaða stadionøkið




Ætlaða stadionøkið og 300m linjan



Fótbóltsvøllurin í dag